# upsanum er álvarsom



- Okkara myndugleikar eiga ikki at loyva stórum svartkjaftatrolarum inn á føroysku grunnarnar uttan við rist í trolinum. Vit eiga at gera nakað við hetta nú, soleiðis at vit ikki saga greinina av, sum vit sita á, sigur upsaskipari. Myndin er tilvildarliga vald

gott, tí hetta kemur ikki at taka nakað frá nøkrum.

- Vit lata nógvan svartkjaft undan Føroyum gjøgnum árini, men vit hava einki eftirlit við, hvussu nógvur upsi – og kanska eisini toskur – verður tikin av føroysku grunnunum av útlendingum.

### Helvtin upsi!

Skiparin, sum í mong ár hevur fiskað upsa undir Føroyum, sigur, at hann hevur mann við sær, sum hevur siglt við einum av teimum stóru føroysku svartkjaftatrolarunum.

- Hesin hevur fortalt mær, at okkurt hálið, sum var upp á eini 70 tons, var helvtin stórur upsi!

Skiparin vísir á, at sjálvandi er hjáveiðan av upsa og toski ikki líka stór alt árið.

- Á Munkagrunninum og millum Munkagrunnin og Føroyabanka er lítil íblanding, men hugsandi er, at íblandingin av stórum upsa er nógv størri eystanfyri og vestanfyri um várið og heystið. Somuleiðis er íblanding av toski, tá ið roynt verður vestur ímóti Íslandsrygginum. Íslendskir myndugleikar hava nevniliga verið noyddir at steingja leiðir, tí íblandingin av toski hevur verið so stór.

Hann sigur, at tann stóri upsin kemur ikki inn á grunnin uttan um heystarnar og várarnar.

- Tað er kent millum fiskimenn, at tann stóri fiskurin ávísar tíðir av árinum - og á ávísum leiðum - gongur uppi í svartkjaftinum og sildini.

### Krevja rist

Skiparin heldur, at viðurskiftini við íblanding av stórum upsa og toski eiga at kannast út í æsir, soleiðis at vit vita, hvussu støðan er, tá ið samráðingar aftur verða við eitt nú russar og ES um svartkjaftin.

- Føroyskir myndugleikar eiga ikki at loyva stórum svartkjaftatrolarum inn á føroysku grunnarnar uttan við rist í trolinum. Vit eiga at gera nakað við hetta nú, soleiðis at vit ikki saga greinina av, sum vit sita á. Tí, øll skulu vit liva her, sigur skiparin, sum heldur, at hetta er eitt mál, ið eigur at verða tikið í nógv størri álvara enn higartil.



# Feløgini samdust um at leingja sáttmálan til 1. januar



*Sáttmálin millum skipabólkarnar og FSN er framlongdur til 1. januar 2006*

Mynd: Vilmund Jacobsen

**Tað verður einki verkfall í fiskiskipaflotanum á hesum sinni. Feløgini, sum hava samráðst um nýggjan sáttmála síðan fyrst í hesum árinum, samdust mánadagin um at leingja verandi sáttmála við smáum broytingum**

SÁTTMÁLI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinnapartin mánadagin komu Skipara- og Navigatørfelagið og umboð fyri teir seks skipabólkarnar ásamt um at leingja verandi sáttmála til 1. januar komandi ár.

Hetta hendi, eftir at feløgini høvdu sitið á samráðingarfundi við semingsmenninar á Hotel Føroyum.

- Vit eru samdir um, at verandi sáttmáli skal halda fram, og tí verður einki verkfall, sigur Jákup Sólstein, formaður í Føroya Reiðarafelag.

Semingsmenninir løgdu eitt semingsuppskot fyri partarnar fríggjakvøldið, og feløgini fingu freist til klokkan 15 seinnapartin mánadagin at taka støðu til uppskotið. Hvørgin parturin tekur treytaleyst undir við seinasta semingsuppskotinum, og tí varð roynt at finna eina semju, báðir partar kunnu góðtaka.

Hetta eydnaðist so umsíðir, og nú er verandi sáttmáli við smávegis broytingum longdur fram til 1. januar 2006.

### Drúgvar samráðingar

Fiskiskipabólkarnir, sum eru limir í Føroya Reiðarafelag, eru átta í tali.

Tveir teirra, Felagið Línuskip og Felagið Ídnaðarskip, sum bert eru nøkur heilt fá skip, gjørdu herfyri sáttmála við Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

Teir skipabólkar, sum sótu við samráðingarborðið við Føroya Skipara- og Navigatørfelag mánadagin, eru verksmiðjutrolarar, partrolarar, lemmatrolarar, rækjuskip, kraftblokkaskip og garnaskip.

Upprunaligi sáttmálin millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Skipara- og Navigatørfelag fór úr gildi 1. desember 2004, men hevur verið longdur síðan.